## Petur Elias verður ÍSF forseti

Eingin hevur bjóðað seg fram sum mótvalevni. Freistin til at stilla upp til forsetasessin í ÌSF var úti á midnátt leygardagin. Bert eitt valevni hevur boðað frá sínum kandidaturi, og er tað sandavágsmaðurin, Petur Elias Petersen, sum hevur verið virkin innan ítróttarnevndararbeiði í nærum ein heilan mansaldur. Petur Elias Petersen hevur verið partur av starvsnevndini hjá ÌSF í mong ár, og hevur við árunum bygt upp eitt stórt og breitt kontaktnet, bæði í Føroyum og uttanlands. Petur Elias hevur virkað sum ÌSF forseti, síðani Sølvi Reinert Hansen legði frá sær fyri tveimum mánaðum síðani. Petur Elias er 44 ára gamal. Aðalfundurin hjá ÍSF verður leygardagin tann 29. Mai, har forsetavalið bert verður ein avgreiðsluspurningur.



# FM í estetiskum fimleiki á Hálsi





**FIMLEIKUR** Havnar Fimleikafelag vann kappingarnar hjá kvinnum og unglingum. Ljósið vann kappingina hjá gentum







**Heri Simonsen**

Nógvir áskoðarar vóru møttir í ítróttarhøllini á Hálsi til endabrestin í estetiskum fimleiki. Liðini høvdu øll pussað seriuna av, og tað sást aftur á fimleikarunum sum vóru sera uppsettir til kappingina . Tað sást tó ikki á fimleikarunum, at tær høvdu nervar. Gentuliðið hjá Ljósinum megnaði at halda uppá fyrsta plássi, men tó bert við 0,86 stigi frammanfyri Støkk, sum bleiv nummar tvey. Unglingarnar hjá HFa struku aftur avstað við fyrsta plássinum. Talan er um eitt sera evnaríkt lið. Spenningurin var ikki minni hjá kvinnunum, har bara smáir marginalar vóru imillum liðini. Fyrsta plássi kundi fara alla vegir. Tó vóru tað HF, kvinnur sum aftur gjørdu bart og vunnu kappingina við nærum einum stigi frammanfyri Ljósinum, sum bleiv nummar tvey, og tað vóru 1,13 stig niður til Støkk sum bleiv nummar trý.

*heris@sosialurin.fo*



## Úrslit:

**Gentur:**

| | | |
|---|---|---|
| Ljósið | 13.55 | Føroya Meistarar |
| Støkk | 12,69 | |
| HFa | 12.37 | |
| HFb | 10,62 | |

**Unglingar:**

| | | |
|---|---|---|
| HFa | 14.01 | Føroya Meistarar |
| Støkk | 12,87 | |
| HFb | 11,18 | |

**Kvinnur:**

| | | |
|---|---|---|
| HF | 14.40 | Føroya Meistarar |
| Ljósið | 13,51 | |
| Støkk | 13,27 | |